# 900 heitir dagar í Singapore – ein útlegd gerst til bók




BÓKAÚTGÁVA

Forlagið Hellurnar gevur aftur í ár triðja árið á rað út bók eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard. Hesuferð melir pennurin hjá Jústinusi seg ikki um fisk og tons, siðsøgu og rokskiparar, men um gerandisdagin hjá høvundanum og konuni í fjarskotna Singapore árini 1996-1999.

- Hetta var størsta avbjóðingin í lívi mínum nakrantíð. Ongantíð fyrr havi eg kent meg so einsamallan og fortaptan, sum fyrstu dagarnar til arbeiðis í Singapore, sigur høvundurin, sum fór út í heim at arbeiða fyri donsku sjómanskirkjuna, útsendur av føroysku sjómanskirkjuni.

- Alt var nýtt. Sjálvt tað at keypa vanligar gerandisvørur var ein fyritøka í slævnu luftini, har hitin ongantíð fór niður um 25 stig. sigur høvundurin.

Í januar og februar í ár vitjaði høvundurin og konan Poula aftur Singapore. Hesuferð var setningurin eisini greiður. Tað var við eini bók fyri eyga, at leitað var aftur á gomlu slóðina. Her verður prentað eitt brot, sum lýsir hvussu Singapore sá út fyrsta morgunin í januar í ár, seks ár eftir at Poula og Jústinus, fluttu heim aftur:

8. januar 2006. Beinini eru so hovin, at tað er ikki meira, enn tey ganga niður í skógvarnar. Vit hava verið á ferð síðan klokkan seks fríggjamorgunin, og nú á middegi leygardag eru vit úr Føroyum, umvegis Keypmannahavn og París, endiliga komin til Singapore. Bein hovna, situr tú trongt í einum flogfari, uttan mun til hvussu sunn tey annars eru. Middagsleitið er so nógv sagt, tí lokala tíðin er sjey tímar frammanfyri, og hóast vit hava etið franskan morgunmat í Air France flogfarinum beint frammanundan, meðan við flugu niður gjøgnum Malakkastrætið, so er kvøld, nú vit eru komin til Singapore, ein hálvan tíma seinni. Eg seti klokkuna tímarnar fram, meðan vit koyra inn frá floghavnini til Allson hotel í Victoria Street.

Tíðarmunurin ella jetlagið ger um seg. Vit leggja okkum klokkan ellivu um kvøldið, og klokkan fýra eri eg vakin aftur. Púrasta vakin, liggi og vendi mær og eri kaldur. 27 stig eru uttanfyri, men vit hava sett kølingina á kamarinum ov lágt, niður á 20 stig, og tað kennist kalt inni. Konan svevur, og eg eri aftur í Singapore. Seks ár eru síðan seinast. Eg minnist so væl, tá ið vit søgdu býnum farvæl 27. januar í 1999 á veg heim til Europa. Nú eru vit aftur. Eg kenni henda býin so væl. Starvaðist í donsku sjómanskirkjuni í hálvt triðja ár frá 1996-1999 júst í hesum býi og var í hvørjum króki hesa tíð.

Eg vendi mær nakrar ferðir og farið síðan upp og út. Tað er sunnumorgun, og droparnir detta ótættir niður á váta asfaltið uttanfyri Allson Hotel í Victoria Street, har vit búgva. Úti á redini ella kanska longri suðuri er toruguðurin Tórur á ferð. Himmalin lýsir hvítt bláur, hvørja ferð tað brestir har uppi, men toran er í morgun so langt burtur frá okkum, at vit bert síggja ljósini. Tú sær ikki sjógv úr Victoria Street, men eg eri so staðkendur í Singapore, at eg veit ættina, uttan mun til hvar eg eri. Býurin kennist ikki so vandamikil, sum tá ið eg var her fyrstu ferð fyri níggju árum síðan. Eg kenni hann. Gangi fram við nøkrum trøum og hugsi um slangur og annað skriðkykt, sum livir her í tropunum, skapningar sum europearar ikki eru vanir við. Hugsi, síggi eg eina slangu, so heilsi eg henni vælkomnan eins og allar aðrar skapningar. Eg ræðist tær ikki longur, heldur ikki túsundbein, sum eru eina spón til longdar, ella kvikar eiturkoppar. Tað eru bara tvey av guds djórum, sum eg veit um, sum vísa, at eg og Gud ikki hava sama smag. Tað eru rottur og morreyðir kakkulakkar. Uttan mun til, hvussu eg royni at hugsa, at hesi djór eisini hava rætt í skapanarverkinum, so vendist í búkinum, tá ið eg hugsi um tey. Kanska onkur terapeutur fer at broyta hetta í framtíðini. At mær ikki dámar júst hesi bæði djórini, hevur onki við Singapore at gera. Eg kendi longu vaml við hesi djór sum smádrongur í míni heimbygd Oyndarfirði norðuri á 62 stigum og sjey stigum vestur, langt úti í Atlantshavi, miðskeiðis millum Ísland og Skotland, eitt fáment oyggjaland, sum næstan ongin í Singapore veit um at siga.



Her eru fá fólk at síggja. Onkur ung ganga hond í hond. Tey hava verið í býnum, eru forelskaði, flætta fingrar og hyggja djúpt inni í eygunum á hvørjum øðrum við langtan í kroppinum. Heima bíðar kanska ein song ella onkur myrkur krókur uttan fyri til elskunnar søtu loyndarmál. Soleiðis er tað kring allan heim, og vísir menn siga, at forelskilsi er eitt bluffnummar frá náttúrunnar síðu. Uttan forelskilsi kom mannaættin ikki undan. Hjúnafelagar vita av royndum, at tað tekur minst tiggju ár at kenna felagan so mikið, at fult álit er í millum, og so leingi kann náttúran ikki bíða.

Hví búgva vit akkurát á Victoria Street og hví akkurát á Allson hotel. Hetta er ikki av tilvild, og tá ið eg nú royni meg sum søgusigara, so eigur hetta at koma við. Árini, eg arbeiddi sum deknur í Singapore, kom eg nógv saman við lokala fólkinum í býnum, og vit hittust á eini kaffishop á Victoria Street. Eg fann lokalar vinir beinanvegin eg kom til býin og vit hittust ofta í eini kaffishop í Victoriastreet, har eisini stórt úrval av av eysturlendskum mati. Vit plagdu at spæla billiard nærhendis. Eg leitaði eftir kaffistovuni fyrr um kvøldið, men hon er burtur. Har hon lá, er komin ein risabygningur í mongum hæddum við poleraður veggjum, kaldur og púrt einki sigandi á nátt, men allarhelst fullur av lívi um dagin. Tað var um reppið, at Seven Eleven shoppin reyk við í hesi byggiætlan, men hon stendur eftir saman við einum lítlum hotelli, kleimd millum nýggja bygningin og hotellið, vit búgva á. Beint við síðuna av og omanfyri nú horvnu kaffistovuna var ein snookersalón. Hon er eisini burtur. Her plagdi eg at leika snooker saman við Sabai og Dave, tveir vinmenn úr Singapore, sum eg traff á hesi snookerbarr. Eg stóð uttanfyri sum Kánus fyrr kvøldið fyri, hevði glett meg at vitja snookermenninar aftur og kann nú bara ímynda mær í minninum, hvussu tað var.

Alt broytist, og onki er nýtt undir sólini. Eg gangi oman eftir Victoria Street og síggi nú nýggja snookerog poolbar, og henda hevur eins og tann gamla opið allan sólarringin. Gangi framvið glaður í huga, kanska onkur hevur hug. Hyggi inni gjøgnum vindeygað, har stendur ein og roynir seg, men hann er so kringur, at eg fari ikki innar.

Alt er tó ikki broytt í Victoria Street kring Allson hotel. Fyrr vóru tvey hawkersentur, nú er bara eitt, og tað er harafturímóti slett ikki broytt. Klokkan er hálvgum fimm, og eg fari inn á botn og bestilli ein kop av kaffi, coppe all, sum singaporeanararnir kalla tað. Tað er kaffi við sukur og mjólk, sera søtt og styrkjandi. Seti meg niður á ein plaststól, møblarnir eru úr plasti, lættir at handfara og lættir at halda reinir. Tey vaska og rigga til at rigga av. Ein serligur luktur hongur í luftini, hann stavar frá rísi, grønmeti, olju, svínakjøti, høgguslokki, soppum, nudlum, chili, carry, laksasuppu, meegoreng, nasigoreng, og eg kundi hildið fram eina síðu aftur at at nevnt heitini á orientalskum mati.

Framman fyri meg situr ein maður í bláari skjúrtu, terrylenbuksum og sandalum undir naknu fótunum. Hann hevur ein vøkstur ut frá høgra vanga, sum er sum ein stór mangofrukt til støddar. Húðin er spent um henda tumor, sum slíkir vøkstrir verða kallaðir á læknamáli. Blíða andlitið er skemmað av vøkstrinum, og eg hugsi, hví maðurin ikki verður hjálptur av heilsuverkinum. Ein skuldi hildið, at tað við útsjóndini kundi gera tað sama, tá ið ein soleiðis ólukkuliga hevði fingið eitt eyka høvd út úr vanganum, tó so er ikki. Meðan eg sitið og drekki mítt søta kaffi, situr maðurin við kambi og kembir svarta vakra hári og gevst ikki, fyrr enn hann er nøgdur við úrslitið.

Tey eru ikki serliga blíð her inni, og visti eg einki um Singapore, so hevði eg kanska havt illar tankar um hesi fólk, sum nú hava verið upp í einar 12-14 tímar. Her eru fyri tað mesta kinesarar í morgun, og kinesarar smílast ikki beinanvegin, tá ið teir hitta ein fremmandan. Tær royndirnar gjørdi eg fyri níggju árum síðan, og eg sanni tær aftur nú. Ongin orsøk er tó til fordóm, hitt teir nóg ofta, og tú fært vinir fyri lívið. Vinsælari maður enn ein kinesari, sum tú hevur lært at kenna, er ringur at finna.

Eg droymdi, at eg hevði í dreymi vitjan av oddamanninum Henry Lee Kuan Yew. Hetta er ein merkisverdur maður, eg kenni hann ikki enn, men eg veit, at hann hevur sveimað sum ein skapandi ond yvir Singapore síðan einaferð í fimmtiárunum og hann hevur verið oddamaðurin aftanfyri tað ovurhondsmenning, sum hesin tá fátæki malayiski býur hevur verið úti fyri. Hann hevur skrivað nógv, millum annað tvær tjúkkar bøkur um søguna hjá Singapore. Tær telja heilar 1500 síður, og eg havi einki lisið enn. Eg eri eitt sindur skeptiskur fyri sjálvsævisøgum, tí eg veit ikki, um høvundurin er nóg kritiskur. Hinvegin er talan um fyrsta honds vitan, og eg fái neyvan skrivað eina sanna bók um Singapore, uttan at eg lesi, hvussu Lee Kuan Yew hevur upplivað hesa menning.

Eg eri skrivandi maður, útbúgvin journalistur, og havi starvast sum skrivandi journalistur á bløðum alt mítt vaksna lív. Longu fyrstu tíðina í Singapore sá eg fyri mær, at eg átti at skriva um, hvussu eg upplivdi hetta fyri meg nýggja samfelagið, so langt skotið burtur frá øllum tí, eg sjálvur kenni, so øðrvísi enn alt tað, eg higartil havi sæð. Nú eri eg aftur tíggju ár seinni, konan Poula er við, eg havi lovað henni at halda feriu saman við henni, men veit innast inni, at hetta lyftið kann eg ikki halda. Ein bók melur í høvdinum, og tann innari bandupptakarin er longu settur á upptøku. Skulu vit hava feriu saman, so mugu vit leita okkum onkra aðrastaðir. Tað vóru eisini vit bæði, sum fóru út saman í 1996, kanska størsta avbjóðingin nakrantíð í okkara lívi. Her upplivdu vit gleði, her upplivdu vit sorg og gjørdust nærri knýtt í meldrinum.

“900 dagar í Singapore” telir 382 síður, kostar 399 krónur og er millum tær bíligastu bøkurnar á marknaðinum í ár roknað eftir síðutalinum.